# Góði leigari

Til lukku við nýggja leigubústaðinum. Vit vóna, at tú kemur at trívast væl.

Sum leigari hjá Bústøðum hevur tú ábyrgdina av viðlíkahaldinum í tíni egnu íbúð.

Ikki er loyvt at gera týðandi broytingar í íbúðini uttan loyvi frá Bústøðum. Tú kanst t.d. ikki seta eyka vegg upp í íbúðina, bora niður í gólvið, e.tíl. Loyvt er at mála veggirnar og at heingja myndir e.tíl. upp. Tó skal íbúðin handast aftur í sama standi, tá tú flytur úr íbúðini, sum tá tú flutti inn í íbúðina.

Um íbúðin ikki er í sama standi við útflytan, verður kostnaðurin fyri at gera hana í sama stand trektur av tínum depositum.

Størri viðlíkahald so sum umvælingar, og eisini viðlíkahald av uttandura felagsøkjum taka umsjónarfólkini hjá Bústøðum sær av.

Sum leigari býrt tú tætt saman við fleiri øðrum leigarum. Tá so nógv ymisk fólk búgva so tætt at hvørjum øðrum, er serstakliga umráðandi, at tú sum leigari vísir umhugsni og tolsemi, so øll kunnu trívast væl saman. Tað skal soleiðis vísast tolsemi yvir, at tað hoyrist og upplivist, at grannar búgva tætt, tó uttan at tað er til óneyðugan ampa fyri grannalagið.

Stýrið fyri Bústaðir hevur samtykt yvirskipaðar húsreglur, sum tit hava fingið. Hesar reglur greina, hvussu leigarar skulu bera seg at, fyri ikki at vera til ampa fyri onnur.

Tað, sum er mest umráðandi, er at allir leigarar hava forstáilsi fyri, at tá so nógv fólk búgva saman, er neyðugt at virða hvønn annan og royna at fáa eitt gott og vælvirkandi grannalag.

Hevur tú spurningar ella ivamál, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Bústaðir á tlf. 40 10 00 ella skriva til bustadir@bustadir.fo

Bráfeingisboð kunnu ringjast á tlf. 401040 uttanfyri upplatingartíð hjá Bústøðum.

Vinaliga
Bústaðir